# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Handan pelikanin var eftir øllum at døma ikki nøgd við 5,5 kilo av fiski*

*bretskur fuglafrøðingur*

# Blair á botni

**Undirtøkan hjá bretska arbeiðaraflokkinum er nú tann minsta í 20 ár.**

Var parlamentsval í Bretlandi í dag, hevði arbeiðaraflokurin fingið ein dyggan frammaná. Er ein meiningakanning hjá blaðnum The Guardian eftirfarandi, hevði flokkurin fingið 29 prosent av atkvøðunum og heili 10 prosentstig minni enn tann konservativi andstøðuflokkurin.

Sambært The Guardian hevur stuðulin hjá arbeiðaraflokkinum ikki verið so lítil síðani 1987, tá Margareth Thatcher vann fyri triðju ferð. Í kanningini fáa tey konservativu 39 prosent og liberaldemokratarnir 22 prosent.

Kríggið í Irak og áhaldandi kreppur í stjórnini hava ikki bøtt um umdømið hjá Tony Blair, forsætisráðharra og flokkinum, sjálvt um eygleiðarar eru á einum máli um, at landsfundurin herfyri eydnaðist væl, og at fleiri aftur fingu álit á Blair og flokkinum. Her er eisini vert at hava í huga, at kanningin hjá The Guardian samsvarar ikki rættiliga við aðrar kanningar, sum eru gjørdar teir seinastu dagarnar, tí sambært teimum er undirtøkan heldur frægari, enn kanningin hjá The Guardian vísir.



*Tann seinasta meiningakanningin er ikki serliga hugaligur lesnaður hjá Tony Blair, forsætisráðharra.*



# Pelikan svølgdi dúgvu

**Fólk í einari lund í London fingu eina ógvuliga sjáldsama sjón seinnapartin í gjár.**

Tað kendist, sum at hugnin hvarv í St. James's lundini í London eina løtu seinnapartin í gjár, tá fólk gjørdust vitni til ein sjáldsaman tilburð í fuglaheiminum.

Ein dúgva, sum gekk og pikkaði breyðmolar og annað smátt, varnaðist eftir øllum at døma ongan vanda, fyrr enn ein pelikan kom og tók hana upp í nevið. Fólk, sum sóu tilburðin, greiddu frá, at dúgvan stríddist fyri lívinum í einar 20 minuttir, áðrenn tað eydnaðist pelikanini at svølgja hana.

– Pelikanin gloppaði nevinum einar tvær ferðir, meðan dúgvan stríddist. So eydnaðist tað henni at venda dúgvuni, so hon kundi svølgja hana eftir høvdinum. Dúgvan flagsaði, líka til hon fór niðurum, greiddi myndakvinnan Cathie McNaughton frá.

Bretskir fuglafrøðingar eru ovfarnir av, at pelikanin tók dúgvuna.

– Allar lærubøkur siga, at pelikan livir av fiski, so hetta var sera óvanligt, sigur ein talsmaður hjá einum bretskum fuglafrøðifelagsskapi. Hann vísir á, at pelikanirnar í St. James's lundini fáa 5,5 kilo av fiski um dagin, men tað er eftir øllum at døma ikki nóg mikið hjá øllum.

Pelikanir hava verið í St. James's lundini líka síðani 1664, tá Charles II kongur fekk fuglarnar frá russiska sendiharranum. Í dag eru tær fimm í tali.



# USA klárar eitt kríggj afturat

**Amerikanski herurin kann vinna øll kríggj, sigur verjuovastin.**

Hóast USA er í kríggi í Irak og Afghanistan, forðar tað ikki fyri, at landið eisini kann klára eitt kríggj afturat, sigur Peter Pace, verjuovasti. Hansara støða er greið:

– USA kann vinna eitt kríggj afturat, sama nær og hvar, sigur hann og leggur afturat, at amerikanska hermegin er so stór, at hon er før fyri at átaka sær eitt kríggj afturat í morgin, um tað skal vera.

Generalurin avsannar sostatt gitingar um, at USA kann einki gera við eitt nú Norðurkorea, so leingi amerikanski herurin hevur so nógv herfólk í Irak og Afghanistan. Hinvegin ásannar Peter Pace, at skuldi USA verið noytt upp í eitt kríggj afturat nú, hevði hetta kríggið uttan iva kravt fleiri sivil mannalív enn hini bæði, tí tær flestu fregnartænastukreftirnar verða brúktar aðrastaðni.

– Men tað er eingin ivi um, hvør hevði vunnið, leggur Peter Pace afturat.

## STUTT SAGT

### Góð íløga

Fyri einum góðum ári síðani keypti A.P. Møller-Mærsk ein part av einari stórari oljuverkætlan í Kolombia, og nú bendir nógv á, at hetta var ein sera góð íløga, skrivar Børsen. Sambært blaðnum kann danska felagið fáa einar 100 milliardir krónur burtur úr íløguni tey næstu 15-20 árini. Tað er brasilska felagið Petrobras, sum borar fyri Mærsk, og tað felagið sigur seg hava sera góðar vónir um úrslitið. Í danska felagnum vilja tey harafturímóti einki siga um útlitini. Tey vátta bara, at Petrobras borar fyri Mærsk.

### Charles kannast

Sum hertogi av Cornwall fær Charles prinsur løn frá hertogadøminum. Henni hevur hann goldið skatt av, men nú er illgruni um, at hann hevur ikki goldið skatt av sínum kapitalvinningi og heldur ikki felagsskatt. Sky News veit at siga, at ein serlig skattakanningarnevnd hevur biðið fíggjarmálaráðið í London greiða frá, hví prinsurin ikki hevur goldið tann skatt, sum hann skal gjalda sambært lógini. Samstundis hevur nevndin biðið um innlit í øll inntøku- og skattaviðurskifti hjá prinsinum. Sky News sigur, at kemur nevndin eftir, at Charles hevur snýtt skattavaldið, kann hann fáa eina stóra eykarokning.

### Jeltsin sjúkur

Fyrrverandi russiski forsetin Boris Jeltsin liggur á sjúkrahúsi í Týsklandi, har hann skal kannast fyri hjartað. Fyri tíggju árum síðani fekk Jeltsin eina sokallaða bypassskurðviðgerð í Moskva, og síðani hevur hann verið til regluligar kanningar á einum sjúkrahúsi í Berlin. Jeltsin hevur verið heilsuveikur í mong ár, og hansara heilsa bleiv ofta umrødd, meðan hann var russiskur forseti frá 1991 til 1999. Harafturímóti hevur hann verið lítið frammi í fjølmiðlunum, síðani hann fór frá.